# HEILSANIR



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum, sum gleddu meg á fermingardegnum.
**Heilsan Sigrun Johannesen, Toftir**



**Hey hon sjálv**
Hvør skuldi trúð, at henda steikin fyllir 45 ár. Júst, tú hevur gjørt ein ordans fong.
**Heilsan myndaeigarin**



**Góða Cecilia**
Tillukku við tí seinasta tannárinum í morgin. Hav tað gott á CISV-leguni.
**Heilsan mamma**



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum. Eg elski teg.
**Heilsan babbasa**



Hjartaliga tillukku á 18 ára degnum 10. juli.
**Ynskja mamma, babba, Hildibjarta og Súnmundur**



**Góða Kristina**
Hjartaliga tillukku við 17 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan mamma, pabba og systrar**



... og eisini tillukku frá mær



**Góða Natalia**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 10. juli. Vit elska teg.
**Omma og abbi í Miðvági**



**Ciao, numero 2!**
Eventualmente, non li ho spaventati troppo. Era solo ment come scherzo piccolo. Con questa immagine piccola vi auguro il buon compleanno e tutto il la cosa migliore!
**Bellezza di sonno**



**Góða fitta Jónfríð Sigga**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 12. juli. Harrans signing í framtíðini.
**Mamma, babba, Jóhann Kartni og Julian**



**Góða elskaða Jórun**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 11. juli. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja Kristianna, mamma og babba**



**Góða Joan**
Tillukku á tínum 18 ára degi. Alt gott í tíni framtíð.
**Ynskja omma og abbi**



**Góða Frida**
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum. Takk fyri fleiri stuttligar løtur í summar. »Nú grør, ja hvør einasti bøkkur«
**Heilsan »Dvørgurin á Mølini«**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:............................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..............................................................
Bústaður: ........................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




# TILTØK

**Gudstænastur**
**5. sunnud. e. trinitatis**
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer. Talvan gongur í Norðoya vestara prestagjaldi fyri Hina føroysku sjómansmissiónina
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Elsa Funding
*Kvívík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Sørvágur:* kl. 11, Inga Poulsen Dam
*Tvøroyri:* kl. 11, altarg., Jónsvein Bech
*Vágs kirkja:* kl. 11 Ólavur Rasmussen
*Selatrað:* kl. 11, altarg., Jógvan Fríðriksson. ***Í Sjóvar prestagjaldi*** gongur talvan fyri Sjómansmissiónina hjá HM
*Eiði:* kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa, Emil Olsen. ***Í Eiðis prestagjaldi*** gongur talvan fyri Sjómansmissiónina hjá HM
*Vesturkirkjan:* kl. 11,
*Kirkjubøur:* kl. 12.15, Heri Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11, altarg., skriftamál kl. 10.40, Bjarni Bæk. ***Talvan gongur*** fyri hjálpararbeiðið hjá M/S Anastasis
*Nólsoy:* kl. 12, altarg., Jóannis Fonsdal
*Glyvrar:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð. ***Í Glyvra prestagjaldi*** gongur talvan fyri Sjómansmissiónina.
***Talvan gongur í Argja kirkju*** fyri Føroysku Sjómansmissiónina
***Nes Prestagjald:*** Talvan gongur sunnudagin fyri Føroysku Sjómansmissiónina
***Fuglafjarðar prestagjald:*** Talvan gongur fyri Føroysku Sjómansmissiónina.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Á møtinum talar Ólavur Jøkladal. www.hebron.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Martin Thomsen.

**Lívdin**
*í Fimleikarhøllini*
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjuløta saman við børnunum við sangi og søgu, kl. 11.10 ein steðgur við drekka. Tilbiðjanarmøti verður kl. 11.30 har Jógvan Júst Rasmussen talar. Barnatiltak verður í Hoyvíkshøllini frá kl. 11.30-12.15. www.livdin.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti við Tummas Jacobsen, kl. 11.50 ABC »Grøðing við Jesu sárum« 2. partur við Sonna Djurhuus.
Einki møti kl. 18 vegna tiltak inni á Sundi í samband við vitjan av Anastasis.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar forbøn ring 214067. www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Benny Blumensaat, presti í Mariukirkjuni.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 18 Útimissiónsmøti v/ Christopher og Maureen Clarke.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltíð Harrans.
Sunnudagsskúlin í summarfrí, kl. 18 Evangel. møti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ manning frá Anastasis.
Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí. Útikonsert inni á Sundi kl. 18.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

**M/V Anastasis**
Í dag og til mikudagin 13.7. er møguleiki at vitja skipið millum kl. 10 og 17, tó sunnudagin millum kl. 13 og 21. Sunnukvøldið útikonsert á Sundi kl. 18 við føroyskum bólkum. Í kvøld kl. 19.30 Afrikanskt kvøld í høllini á Nabb.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnukvøldið kl. 19 Møti v/ Árna Jacobsen, Leirvík.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Signabø og Kollafjørður**
Heimamissiónin hevur útimøti leygardagin kl. 19 á Signabø og kl. 21 við Missiónshúsið í Kollafirði.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ breyðbróting, Dávid Bech talar. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Miðvágs Missiónshús**
Einki møti verður sunnukvøldið.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Felagsmøti Hósvík-Hvalvík verður sunnudagin kl. 18. Hetta er samstundis seinasta møti áðrenn summarsteðgin, eisini verður ein støðgur við ungdómsmøtinum, vit lýsa aftur, tá vit byrja í august. Gott summar.

**Bønhúsið á Hellunum**
Sunnukvøldið kl. 19 Møti við Niels Jacob Nielsen, trúboðara. Innsavnan.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti, luttøka frá Anastasis.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Pola Jacobsen. Øll eru vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18 Møti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 19 Møti v/ Vagn Foldbo.
Mikukvøldið kl. 19 Møti v/ Hanus Poulsen, drekka verður aftaná.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnumorgunin kl. 11 Møti við André Matras.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Rúna og Guru í Árantsstovu. kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ skandinavisku barnamissiónini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti.
Mikudagin kl. 20 Møti. Tú ert vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Johan og Signheðin. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Møti verður sunnukvøldið v/ Jónsvein Bech.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin kl. 20 Útimøti við posthúsið.
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti, Magnus Jensen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur, um viðrar. Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøld kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Samkoman Malta Skagerak-fundirnir**
Cosmos Trawl, Østhavnen, Hirtshals. Fundirnir verða soleiðis: 8. juli og 23., 24. og 25. juli. Á fundunum 23.-25. juli luttaka ferðandi og onnur við vitnisburði og sangi. 5. august verður seinasti fundur. Allir fundirnir eru kl. 19.30. Aftaná fundirnar bjóða vit ein kaffimunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Tilhaldið verður stongt vegna umvæling frá:
**28. juni til 26. juli og frá 30. juli - 13. august.**
**Ólavsøkuframsýning verður í Tilhaldinum 28.-29. juli.**
**Brúðarmyndir 1919-1971. brúðarkjólar, fjarrit.**
**Søla: Drekkamunnur og drýlur í kjallaranum. Opið: kl. 15.00-19.00.**

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – Gongutúrur**
Sunnudagin 11. juli verður gongutúrur til Fransatoftirnar uppi á Sátuni. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 14.00. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 17. juli kl. 14.00 giftast í Funnings kirkju Jenny Petersen úr funningi og Magnus Samuelsen úr Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00.

Leygardagin 17. juli kl. 15.00 giftast í Hejls kirkju Kitty Ferjá Joensen, Kollafjørður og André Isholm Andrésen, Tórshavn. Dagurin verður hildin á Hotel Harmonien, Gåskærgade 19, 6100 Haderslev.

Sunnudagin 18. juli kl. 12.15 giftast í Vesturkirkjuni Heidi Gásadal og Herman Lindberg. Aftaná vígsluna, uml. kl. 13.30 til 16.00 verður móttøka heima í Mannbrekku 13, Hoyvík. Øll eru vælkomin.

24. juli kl. 16.00 giftast Gitte Johannesen og Finnur Klein í Dómkirkjuni. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00.

Leygardagin 24. juli giftast í Trongisvági Wenche F. Lindberg, Trongisvágur, dóttur Óla Jákup Lindberg, og Rúni Aarethún, Fanø, Norra. Veitslan verður fyri innbodnum inni á Sandinum hjá Jonnu og Óla Jákupi Lindberg, Trongisvágur.

Leygardagin 31. juli kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Julianna M. Askham, Hvannasund og Silas K. K. Olofson, Klaksvík. Døgurði verður fyri innbodnum í Skálanum og vælkomst verður kl. 21.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 452002 ella 261283 áðrenn 18. juli.

Fríggjadagin 6. august kl. 15.00 giftast í Gøtu kirkju Katrin Sigurðsdóttir, Norðragøta og Karstin Kristiansen, Leirvík. Opið hús við nátturða og drekkamunni verður í Róðrarneystinum á Glyvrum kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma verða biðin um at ringja á tlf. 443241 ella 441363 innan 30. juli.

Tann 7. august giftast í Klaksvík Mette Gade frá Glyngøre og Leif Berg Jacobsen úr Klaksvík. Vígslan verður í Betesda kl. 15.00. Vælkomst verður á Hotel Norð kl. 19.00 og tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 23. juli á tlf. 226925 ella 224383.

Leygardagin 7. august giftast Jóna Petra Thomsen, Skopun og Jóhan Mikkelsen, Sørvágur. Vígslan verður í Skopunar kirkju kl. 11.00. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum Samljóð í Skopun kl. 19.00. Teistin siglur úr Skopun á Gomlurætt sunnumorgunin kl. 4.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 23. juli á tlf. 332312, 361575 ella 253001.

## SILVURBRÚDLEYP

Mánadagin 12. juli hava Jóngerð og Sjúrður Mikkelsen, Sørvágur, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin heima við hús sunnudagin 11. juli frá kl. 10.00 á morgni. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Gull og silvur tykkara er rustað upp, og rusturin á tí skal verða til vitnisburðar móti tykkum og eta hold tykkara eins og eldur. Tit hava savnað dýrgripir á teimum seinastu døgunum«*
*(Ják. 5.3.)*

Eisini Jesus hevur í fjallaprædikuni tala um teir skattir, sum mølur og rustur etur. Men Jákup setur tað enn harðari upp. Sjálvt børn vita, at gull rustar ikki og silvur í mesta lagi gerst óblankt, men forferst ikki. Hesi bæði mtallir eru tey, sum menniskjan altíð hevur sett álit sítt á, tá ið hon skuldi tryggja sítt ríkidømi.

Men í bíbliuørindinum omanfyri vera tey ein mynd av nøkrum, sum røkkur víðari, tað at seta álit sítt á heimsins lutir í heilatikið. Tað kemur fram í teimum seinastu orðunum. Teir seinastu dagarnir – hví seta tit tá álit tykkara á lutirnar í hesum heimi, ið longu detta sundur og brátt eru horvnir?

Seta vit okkara álit á heimsins gull og silvur, vil rusturin, sum er tess undirgangur, gerast ein vitnisburður móti okkum. Hann skal rópa hart fyri Guðs dómstóli um, at vit settu okkara álit á heimin, men vildu ikki líta á Guð. Og tí skal rusturin »eta holdið eins og eldur«. Dómurin vil ganga ímóti okkum um vit settu álitið á tað, sum ikki heldur, ístaðin fyri at líta á Guðs frelsu í Kristi Jesusi, so at syndir okkara kundu tváast av við blóði hansara og vit standa rein fyri Guðs ásjón.

Ein og hvør av okkum kann stillisliga hugsa um, um eisini vit hava nakað »gull ella silvur« vit líta á ístaðin fyri at líta á Guð. Tað kann vera peningur. Tað kann vera alt, sum bindur likam og sansir okkar – og hvat so, tá ið likamið ikki er longur? Tað kann vera tráan eftir valdi og æru – men hvat so, tá ið vit kortini einaferð eru gloymd við undantak í teirri bókini hjá Guði, har gerningar okkara eru skrivaðir í? Latið okkum sleppa øllum tí, hvørs rustur vil spilla okkum, men savna okkum gripir í himli, har hvørki mølur ella rustur eru til.

Amen!

**John S. Myllhamar**